UTTAN ÚR HEIMI

# Kann hon basa Fogh?




*Helle Thorning-Schmidt vann formansvalið í danska javnaðarflokkinum, men uppgávan verður trupul*

*Mynd: Reuters*

**Nýggi formaðurin í danska javnaðarflokkinum; Helle Thorning-Schmidt, hevur boðað frá einari nýggjari byrjan, men hon fær ein torføra uppgávu**

DANMARK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Við 24.261 atkvøðum vann tann 38 ára gamla Helle Thorning-Schmidt formansvalið í danska javnaðarflokkinum. Mótvalevni hennara, Frank Jensen, fekk 21.348 atkvøður.

Politiskir eygleiðarar eru á einum máli um, at tað var boðskapur hennara um nýhugsan og at beina burtur allar gamlar innanhýsis ósemjur í flokkinum, sum gjørdu, at Helle Thorning-Schmidt vann formansvalið. Í takkarrøðuni gjørdi hon eisini greitt, at tað er ikki pláss fyri bólkum í flokkinum longur.

– Øll er vælkomin, men tey, sum ikki vilja koma við, mugu sita við hús, segði hon. Tann fyrsta avleiðingin kom longu beint aftan á valúrslitið, tá formaðurin í tingbólkinum, Pia Gjellerup, boðaði frá, at hon segði formanssessin frá sær. Í gjár skuldi Helle Thorning-Schmidt manna leiðsluna í fokkinum av nýggjum, og roknað varð við, at fleiri ungar kreftir fóru at sleppa framat. Tann gamla tíðin við Nyrup, Svend Auken, Mogens Lykketoft, Piu Gjellerup og øðrum er farin, skrivaðu donsku bløðini í gjár.

Tær seinastu vikurnar hevur Helle Thorning-Schmidt lagt sent á, at javnaðarflokkurin skal flyta seg nærri miðjuni í donskum politikki. Hetta er ein kós, sum Poul Nyrup Rasmussen fór undir í nítiárunum, og sum javnaðarflokkarnir í Bretlandi og Niðurlondum eisini hava valt. Men nýggi formaðurin skal ansa sær, tí ein treyt fyri, at hon kann loysa Anders Fogh Rasmussen av, er, at teir vanligu stuðulsflokkarnir hjá javnaðarflokkinum kunnu góðtaka politikk hennara.

# Kvinnurnar rýma frá Blair

**Tær bretsku kvinnurnar siga seg ikki hava álit á Tony Blair, forsætisráðhara longur, og tí umhugsa nógvar teirra at atkvøða fyri hinum flokkunum**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Tony Blair. Bara 28 prosent av teimum bretsku kvinnunum halda hann vera reiðiligan*

*Mynd: Reuters*

Nógvir bretar eru av teirri uppfatan, at Tony Blair, forsætisráðharri, var ikki nóg reiðiligur, tá tað snúði seg um kríggið í Irak, og kanningar vísa, at serliga kvinnurnar hava ilt við at líta á hann longur.

Tað er ikki bara kríggið í Irak, sum fær nógvar kvinnur at venda Blair bakið. Kvinnurnar eru heldur ikki nøgdar við ES-politikkin hjá stjórnini, og so halda tær, at stjórnin hevur gjørt alt ov lítið við at bøta um umstøðurnar á sjúkrahúsunum.

Eitt annað málsøki, sum sambært kvinnunum hevur ligið á láni tey seinastu árini, er skúlaverkið, og tað ger, at nógvar ungar mammur helst fara at atkvøða fyri teimum konservativu ella Liberaldemokratunum hesaferð, skrivar Reuters.

Sambært einari spurnarkanning eru tað bara 28 prosent av teimum bretsku kvinnunum, sum hava álit á, at Tony Blair er reiðiligur. Í 1997 hildu 54 prosent av vkinnunum hann vera reiðiligan.

## Metstórt hall

Í februar hevði USA 61 milliardir dollarar í halli á handilsjavnanum. Tað var nakað meiri, enn handilsmálaráðið hevði roknað við, og samstundis nýtt met.

Hallið er úrslit av tí stóra framburðinum í amerikanska búskapinum, sum ber í sær, at innflutingurin veksur skjótt, meðan vøksturin í útflutninginum er nógv minni. Í februar vaks útflutningurin bara 0,1 prosent, meðan innflutningurin vaks 1,6 prosent.

Búskaparfrøðingar halda kortini ikki, at nakar vandi er á ferð. Tað avgerandi er, at uttanlandsskuldin ikki verður ov stór samanborið við bruttotjóðarframleiðsluna. Serfrøðingarnir vísa kortini á, at gongdin við veksandi halli á handilsjavnanum kann gera dollaran veikari. Amerikanski virðisbrævamarknaðurin kennir eisini sviðan av tí stóra hallinum. Tá handilsmálaráðið í Washington kunngjørdi tølini fyri februar, fall kursurin á virðisbrøvum beinanvegin.

## Dýrt at verja umdømið

At tað kann loysa seg at brúka pengar fyri at ávirka amerikanskar politikarar og embætismenn er ikki nakað nýtt, og tað verður eisini gjørt.

Sambært norsku tíðindastovuni NTB hava norskar fyritøkur brúkt meiri enn 30 milliónir krónur til at ávirka amerikanskar politikarar tey seinastu sjey árini. Oljufelagið Statoil er ein teirra, og fyritøkan hevur brúkt fleiri milliónir krónur fyri at fáa amerikanarar at góðtaka, at hon er virkin í londum sum Iran, Irak og Libya.

Kunningarstjórin hjá Statoil, Kai Nielsen, sigur, at USA hevur sett tiltøk í verk ímóti Iran, og tí hevur tað verið umráðandi hjá Statoil at forða fyri, at tiltøkini skulu raka virksemi felagsins har. Børge Brende, vinnumálaráðharri, hevur einki ímóti, at Statoil brúkar pengar fyri at verja sít umdømi í USA, skrivar NTB.

## Eru ikki húnar

Tjóðartingið í Ungarn hevur havnað einum kravi frá umleið 2.500 fólkum, sum halda uppá, at tey eiga at verða viðurkend sum eftirkomarar hjá tí navnframa húnakonginum Attila.

Attila, sum doyði í árinum 453, legði ein stóran part av Evropa undir seg, til hann noyddist at dvína fyri rómverskum og vesturgotiskum herdeildum beint eystan fyri París í 451. Nú 1550 ár seinni vilja umleið 2.500 fólk í Ungarn vera við, at tey eru ættað niður frá konginum, og at tey tí hava rætt til at fáa støðu sum ein etniskur minniluti í Ungarn.

Ungarska tjóðartingið hevur víst uppskotinum aftur, og ungarskir søgufrøðingar og onnur serkøn siga, at tey 2.500 fólkini kunnu ikki prógva, at tey eru húnar. Men tey ætla sær ikki at gevast. Tvørturímóti ætla tey sær at leggja málið fyri ovastu ungarsku dómstólarnar, og fáa tey heldur ikki viðhald har, ætla tey sær til ES við kravinum um viðurkenning.

## Nú verður hann tikin

Í fleiri ár hevur løgreglan í Albania roynt at taka brotsmannin Riza Malaj, og hóast løgreglan meiri enn eina ferð hevur verið í skotbardaga við hann, er hann sloppin undan henni hvørja ferð.

Men nú bendir nógv á, at hann verður tikin. Nú ein dagin var Riza Malaj farin at veiða síl við dynamitti, og tá var hann so óheppin, at ein løðing gekk av, meðan hann fekst við hana. Hann misti báðar hendurnar og fekk eisini skaða í eyguni. Tað eydnaðist honum at koma til eitt lítið sjúkrahús nærhendis markinum til Kosovo, men hóast hann hevur fingið tilboð um at sleppa á eitt størri og betri sjúkrahús í høvuðsstaðnum Tirana, hevur hann sýtt fyri at taka av, skrivar Reuters, tí hann er bangin fyri at verða tikin. Men tað ger tað sama, sigur løgreglan, tí hann verður tikin kortini.

Riza Malaj, sum er best kendur sum tann seinasti "cowboy" í Albania, hevur hildið albansku løgregluna fyri gjøldur tey seinastu fimm árini.